tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Signar — og hvussu við hinum?

## *Oddagrein*

Í skrivandi stund er ógreitt, um landsstýrismaðurin Signar á Brúnni, heldur fram sum landsstýrismaður, ella um hann leggur frá sær. Í gjár frættist, at Tjóðveldisflokkurin var komin til ta niðurstøðu, at Signar á Brúnni eigur at leggja frá sær. Men velur løgmaður ikki at siga landsstýrismannin úr starvi, má hann sjálvur avgera, um hann fer frá ella ikki.

Ikki kann hugsast, at Signar á Brúnni heldur, at hann eigur at leggja frá sær við tí grundgeving, at hann útvegaði Sjónvarpinum pening, so Sjónvarpið kláraði at gjalda starvsfólkunum løn fyri juli mánað í fjør. Tá hetta fór fram síðsta summar, segði landsstýrismaðurin, at landsstýrið hevði skyldu at gjalda starvsfólkum í almennum starvi løn, og at tað var tað, sum hann gjørdi, eftir at hava ráðført seg við sínar embætismenn. Og millum embætismenninar eru bæði løgfrøðingar og fíggjarfrøðingar.

Men taka vit niðurstøðuna hjá løgtingsgrannskoðarunum, so eru tey átta punktini ein lemjandi atfinning, sum ikki kann fara aftur við borðinum. Og so er spurningurin, um tað er nóg mikið við einum nefsi ella átalu. Ella um atfinningarnar eru so grovar, at løgmaður heldur, at Signar á Brúnni ikki eigur at halda fram í landsstýrinum. Tað er óivað tann avgerandi spurningurin, tá hesar reglur verða skrivaðar.

Hinvegin, avger Signar á Brúnni at fara sjálvboðin, ella um løgmaður avger at loysa hann úr starvi, so skal fyri at gera myndina meiri fullfíggjaða eisini sigast, at tað kann eisini setast spurnartekin við avgerðir ella vantandi avgerðir hjá øðrum landsstýrisfólkum. T. d. varð harðliga funnist at Finnboga Arge í samband við málið um landsverkfrøðingin, Henning Jacobsen. Spurnartekin er eisini sett við rættleikan í framferðini hjá Helenu Dam á Neystabø í samband við sparingar á Landssjúkrahúsinum, tá Jákup Mørkøre varð sagdur úr starvi.

Tá alt hetta er sagt, skal kortini leggjast afturat, at tað skerst ikki burtur, at politiskt óveður hevur verið um Signar á Brúnni ein stóran part av hesum valskeiði. Hann hevur havt trupulleikar við fólkaskúlanum. Neyðugt varð við eykajáttan, tí talið av flokkum gjørdist óvæntað stórt, men tá avtornaði vaks flokstalið kortini bara ein part av metingunum. Trupulleikar hava verið við studentaskúlanum. Málið um Múrin í Kirkjubø er ikki loyst. Landsstýrismaðurin kom ikki væl frá málinum um kirkjulógirnar og fekk beinleiðis misálitsváttan frá samgonguni. Og at enda er fólkaskúlin kastaður út í ein arbeiðssteðg, sum vit kundu verið sloppin undan, um Undirvísingar- og mentamálastýrið og Fíggjarmálastýrið høvdu dugað at tosað seg til rættis um kostnaðin fyri nýggju fólkaskúlalógina. Tí er kanska spurningurin, um Tjóðveldisflokkurin ikki heldur, at onkur eigur at loysa Signar á Brúnni av í landsstýrinum, so friður fæst í hesum avgerandi tíðarskeiði.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Lærari í 40 ár

*Frá fyrsta degi – í øll hesi árini sum lærarsi, møtti tú fólki, ið høvdu hin vælkenda <u>ironiska</u> hurburðin: góðalív, altíð frí o. s. fr.*



Mín samvitska kann, og hevur altíð kunna givið eitt greitt aftursvar, ið altíð endaði við hesum orðum frá fólki: »Nei, lærari, tað hevði eg hóast alt ikki viljað verið«.

Men sjálvur, so havi eg haft eitt gott lív sum lærari. Jú, tað er eitt serligt, og ofta sera strævi arbeiði. Tú arbeiðir dag og dagliga við livandi barnasálum, ikki bert sum undirvísari, men í stóran mun verður tú eisini noyddur inn á tað sosiala økið. Arbeiðið kann ikki gerast upp sum eitt vanligt starvs- og verkamannajob frá kl. 8 til 17.

Eg havi ongantíð kent til nakað annað enn, at lærarastarvið hevur verið minst eitt 12 tíma starv.

Aldrin havi eg sagt við næmingar ella foreldur, ið ringdu um kvøldarnar til mín: eg kann ikki tosa við tykkum, tí hetta er uttan fyri arbeiðstíðina!!! Aldrin havi eg avvíst slíka samrøðu.

Tá eg byrjaði sum lærari í 1958 høvdu vit 36 tíma undirvísing um vikuna á 50 min. Krøvini vóru tá so mikið annarleiðis.

Tíðirnar broyttust og soleiðis broyttist eisini krøvini so við og við.

Sum lærari kundi tú ikki arbeiða uttan so, at tú hevði fullan áhuga fyri tínum lærugreinum og fyri tínum næmingum - ein ærusak.

Og soleiðis havi eg altíð kent mínar arbeiðfelagar. Jú, krøvini komu inn á okkum so spakuliga, so sníkjandi – tú tókst alt sum givið, hoyrandi til starvið.

Tó broyttist bundna arbeiðstíðin frá 36 tíma viku niður í 27 tíma viku.

Arbeiðssetningurin varð stungin út eftir eini fólkaskúlalóg og tí lesiætlan, ið fylgdi við.

Hesum havi eg arbeitt eftir øll hesi árini, og havi vitað, hvat var kravt, eg skuldi røkka hvørt einasta ár.

Havi ikki tal á hvussu nógvar næmingar, eg havi ført upp til realprógv og seinni fólkaskúlaprógv – eini 2000 og havi eg eftir besta førimuni lagt alla mína orku í hetta.

Hvussu nógv tíð, eg nýtti um vikuna til hetta, havi eg ongantíð hugsað um – arbeiði skuldi bara gerast. Men kvøldar- og vikuskiftistímarnir vóru nógvir, ið nýttir vóru til skúlaarbeiði. Tú skalt minnast til, at arbeiði var lagt inn í eina tíðarrammu (15/8–1/7) og tað skuldi náast, og sum áður sagt, so veit eg onki annað enn, at vit lærarar royndu alt at veita eitt gott arbeiðsavrik.

Tað bar ongantíð til at leggja okkara arbeiði niður í eina skuffu!!!

Tað er tí hugstoytt, at embætisfólk í høgtløntum starvi í fíggjarmálastýrinum og sjálvur Karstin Hansen landsstýrismaður í dag melda út, at teir ikki vita, hvat lærarin ger í 2/3 av arbeiðstíð síni.

Tá teir vita so lítið, er tað óskiljandi at teir átaka sær einsamallir at sita hinumegin samráðingarborðið við Føroya Lærarafelag.

Teirra stívrendi, samráðingarháttur tænir ongum máli (Dimma 24.03.2000). Onki undarligt at núverandi støða er íkomin.

Uttan persónligu fyrireikingar og eftirmetingartíð læraranna nyttar undirvísingartíðin onki.

Og hvør kann so fylgja við hvat lærarin ger uttan fyri undirvísingartíðina!

**So einfalt**

Gevið skúlaleiðsluni nøktandi ábyrgdarløn – og ikki minst tíð, at fyriskipa og hava eftirlit við, at arbeiðssetningurin sbrt. lógini verður rokkin.

Hvør annar enn skúlaleiðslan kann best standa inni fyri hesum?

Men hava vit ikki ráð til nýggju fólkaskúlalógina – so er at siga tað! so einfalt er tað. Nýggja skúlalógin sigur, at skúlastýri skulu veljast fyri hvønn skúla sær. Her verða umboð fyri foreldur, næmingar og lærarar.

Tað er plikt fólkaskúlans at fylgja við tíðini, og her liggur stór ábyrgd á lærarunum.

Nýggju skúlastýrini skulu skipast at virka frá 1. januar 2001.

Hesi fáa ómetaliga ávirkan, og kunnu saman við skúlaleiðsluni stýra arbeiðsgongdini á skúlanum.

Men hava tey ikki álit á tí einstaka læraranum – so er ikki gott, og so skal sigast til beinanvegin.

Og hevur fíggjarmálastýrið ikki álit á lógini – ja so kann alt gera tað sama.

Møguliga er síðsta petti í oddagrein Dimmalættingar 24. mars 2000 sera áhugavert at umhugsa.

**Petur S. Rasmussen**

# Vármótasýning í Havnar Klubba

*Nú røkkur ikki við einum kvøldi, tá handlar í miðbýnum skipa fyri mótasýning*



Mikukvøldið 29. mars kl. 19.30 og hóskvøldið 30. mars, eisini kl. 19.30, skipa handlar í miðbýnum fyri mótasýning og hugnakvøldi í Klubbanum.

Á sýningunum verður tað nýggjasta innan móta sýnt fram. Sýningarnar verða fjølbroyttar, alt frá innast til uttast, klæðir til børn, ung og vaksin. Tað seinasta innan hármóta verður sjálvsagt eisini at síggja. Somuleiðis luttaka blómu-, gávu- og prýðishandlar, so her verða nógv hugskot til páskini og til várið, sum so spakuliga er á veg.

Luttakandi handlar eru: Benetton, Drós, Fljóðið, Th. Dam Ítróttur, Handilskjarnin damur og harrar, Hjá Kissa, Hon & Hann, Kallkyn, Línbúðin, Madame L, Mótaskálin, Seytjan, Sirri, Skálabúðin, Vogue, Wrangler, Fótbúni, Kjallarin, Boutique Romantika, Frú S, Akkuleya, Trónd Hansen, Salong Ása og Salong Viviann.

Í steðginum er møguleiki at keypa lutaseðlar, gávur og gávukort verða burturlutaði.

Atgongumerki kosta 50,- kr. og fáast í flestu av luttakandi handlunum og á Kunningarstovuni. Við í prísinum er kaffi og okkurt hugnaligt afturvið.

# Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum

*leygardagin 1. apríl skipar Havnar Sjónleikarfelag fyri marknaðardegi í Sjónleikarhúsinum kl. 10-17*

Stórur loppumarknaður verður, har møguleiki er at ogna sær ymsar lutir, t.d. grýtur, vasar, leikur, steintoy, sofaborð, sofur, sengur, lampur, klæðir, bíløt og mangt, mangt annað. Haraftrat er ein rúgva av bókum, sum fáast sera bíliga.

Eitt sindur av timburi at fáa til keyps til tann, ið er fittur í hondunum.

Til tey smáu er fiskibrunnur, har børnini kunnu fiska sær ein pakka.

Stórt tombola við ymsum heimabakstri o.ø. verður eisini á skránni.

Kaffi og temuður verður eisini at fáa.

Øll eru hjartaliga vælkomin og vónandi verður undirtøkan stór!






Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persón-ligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum um-hvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2000 kl. 16.

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin Tinghúsvegur 7 100 Tórshavn Tel 31 48 00 Fax 31 94 82
E-mail: menningd@post.olivant.fo www.sparikassin.fo